



# Útferðir & vitjanir

Møguleiki er fyri hópin av útferðum við søguligum, mentanarligum, vinnuligum, sosialum ella øðrum innihaldi. Sólorka býr í einum vøkrum umhvørvi, og fleiri vakrir og áhugaverdir býir eru i nánd – teirra millum milliónbýurin Valencia við m.ø. katedralinum, sum hýsir heilaga kalikinum.








# Dømi um útferðir í 2025

Søga / mentan



## Guadalest

Busstúrur niðan í tey stórslignu fjøllini til vøkru fjallabygdina. Á turinum hoyra vit um spanska søgu, serliga um maurarnar, og vit vitja m.a. søguríku borgina og óhugnaliga tortur-savnið.

Søga / mentan



Heildagstúrur

## Valencia

Vit vitja ríkispartahøvuðsstað okkara og her m.a. gitna Vísinda- og Listabýin, størsta akvarium í Europa, matvørumarknaðin og dómkirkjuna við heilaga kalikinum.

Vinna



Bert um várið

## Appilsinlundin

Vit koyra til plantasjuna hjá Paulu og Vicent. Vit sansa tað vakra umhvørvið, hoyra um landbúnaðin, henta appilsinir og pressa heimsins besta djús úr teimum á staðnum.

Aktivitetur



## Kajakk / Paddle

Hetta er ein hugnalig og stuttlig vitjan í eini vakrari vík, har kønu vegleiðarar okkara leggja øllum lag á. Í tveir tímar sleppa vit at royna okkum bæði í kajakk og á paddlebretti

Aktivitetur



Heildagstúrur

## River rafting

Sigling við gummibáti í uml. 3 tímar íroknað ein steðg við ábiti. Myndir verða tiknar av øllum. Busstúrurin til ánna í grannastatinum Murcia varir uml. 2 tímar hvønn vegin.

Aktivitetur



## Fossarnir

Eftir ein nokkso stuttan busstúr ber til at leypa á bláman ella bara at taka sær av løttum í hesum vakra og heilt serliga umhvørvinum. Hetta er ein stuttlig útferð við aktiviteti.